# n tolir bara seg sjálva



*- Liberala og postmodernaða gudfrøðin stendur í andsøgn til klassiskan kristindóm og avmarkar kristindómin til ævintýr og Bíbliuna til menniskjansliga frásøgn. Og tá gerst Bíblian til eitt sjálvtøkuborð og kristindómurin til eina døgnflugu, sigur Bergur Debes Joensen, prestur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Fakta

### Bergur Debes Joensen

Føddur í 1966.
Málsligur studentur í 1986.
Cand.theol. frá Københavns Universitet í 1994.
Aðalskrivari, ungdómsráðgevi og blaðstjóri fyri Heimamissiónina síðani 1994. Skrivari hjá KFS í 1994. Prestur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi síðani 1996. Varalimur í føroyska Prestafelagnum síðani 1998 og formaður í føroyska Bíbliufelagnum síðani 1998. Formaður í Kirkjuligu Heimamissióni frá 2001-2006.

Og hvat ger Evropa ítøkiliga við vaksandi búskaparliga og sosiala gapið millum sunnaru og norðaru hálvkúlu? Tað lekur ímillum teori og praksis í Evropa, sigur Bergur Debes Joensen.

**Trúgv og politikkur hanga saman**

Bergur skeinkir meiri kaffi í koppin, setist eina løtu, men fer so aftur upp at ganga, tá prátið kemur inn á relatiónirnar millum átrúnað og politikk. Stóra misskiljingin hjá verðsligu humanismuni er sambært prestinum treytaleysa kravið um at skilja sundur trúgv og politikk.

- Har politikkur er, eru menniskju. Og har menniskju eru, er trúgv. Trúgvin hevur við ALT lívið at gera, og harvið eisini við politiska lívið at gera. Øll menniskju hava eina trúgv í breiðari merking. Eina lívsáskoðan um tú vilt, tí tað finst eingin lívsáskoðan uttan trúarsetningar, sum ikki kunnu prógvast, men mugu trúgvast. Tað verði seg kristindómur, islam, ateisma, verðslig humanisma, New Age, Scientology ella hvat tað skal vera. Og øll heimspeki og politiskar hugsjónir innihalda trúarsetningar. Tí er ógjørligt at skilja ímillum politisk sjónarmið og lívsáskoðan annars, sigur Bergur Debes Joensen.

Og áðrenn undirritaði fær tíð at spyrja nærri, skundar hann sær at modifisera sín pástand. Tí tá hetta er sagt, fer Bergur kortini at tosa um eina partvísa sundurskiljing, tá tað kemur til praktiska valdsbýtið í samfelagnum. Og júst hetta er sambært presti ein integreraður partur av lutherska kristindóminum við sonevndu tvey-regiments-læruni hjá stóru fyrimynd hansara, Martin Luther.

- Altso, vit kunnu orða tað soleiðis, at politikkur og átrúnaður hava bæði ALT og EINKI við hvørt annað at gera. Sum sagt skapar okkara trúgv okkara politisku sjónarmið. Men hinvegin snýr politikkur seg bert um hetta lívið, meðan átrúnaður snýr seg um núverandi lívið og tað komandi lívið. Tað er aðalmunurin millum politiska og átrúnaðarliga valdið. Meðan Guds orð eigur at stýra kirkjuni, eigur manna vit og skil at stýra verðsliga valdinum. Og Bíblian talar sjálv um eina politiska yvirvøld, hvørs uppgáva er at varðveita lóg og landaskil. So í júst hesum týdningi eiga vit at skilja sundur politikk og átrúnað, sigur Bergur Debes Joensen.

Men fyri Berg er markið fyri hesi sundurskiljing, tá verðsligir humanistar vilja flyta átrúnaðin úr almenna rúminum.